# Góðir brúktir bilar

**Nissan Almera 2.0 diesel**
grønur, árg 1999,
4 hurðar
**115.000**

**Opel Astra 1.7D**
grønur, árg 1996,
4 hurðar, km. 120.000
**43.000**

**Nissan Almera 1.6 GX**
vínreyður, árg 2000,
4 hurðar, km. 88.000
**115.000**

**Opel Astra 1.7DT**
grønur, árg 1997,
4 hurðar
**65.000**

**Nissan Primera 2.0 LX**
koboltbláur, árg 1997,
4 hurðar, km. 63.000
**92.000**

**Opel Astra 1.6 Comfort**
svartur, árg 1998,
5 hurðar, km. 77.000
**95.000**

**Peugeot 306 Diesel**
grønur, árg 1996,
km. 155.000, fyrr 75.000,-
**nú 70.000**

**Opel Astra 1.6 Elegance Stc.**
gráur, árg 2001, km. 21.000
**165.000**

**Peugeot 306 Diesel**
bláur,
5 hurðar, km. 203.000
**65.000**

**Saab 9-3 Tid 2.2 115 HK**
bláur, árg 1998,
5 hurðar, km. 117.000
**155.000**

**Peugeot 306 Diesel**
bláur, árg 1996,
4 hurðar, km. 130.000, fyrr 65.000,-
**nú 55.000**

**Ford Escort 1.8**
svartur, árg 1998,
5 hurðar, km. 123.000, fyrr 85.000,-
**nú 74.000**

**Peugeot 405 GTX 2.0**
hvítur, árg 1995,
4 hurðar
**47.000**

**Mitsubishi Carisma 1.6**
árg 1996,
5 hurðar
**88.000**

**Peugeot 406 ST 2.1 DT**
bláur, árg 1998,
km. 153.000, fyrr 127.000,-
**nú 115.000**

**Kia Sephia 1.5**
bláur, árg 1997,
4 hurðar, km. 89.000
**55.000**

**Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/aircon** vínreyður, árg 1999,
4 hurðar, km. 120.000, fyrr 154.000,-
**nú 145.000**

**Ford Sierra 1.8 DT**
vínreyður, árg 1993,
4 hurðar
**45.000**

**Peugeot Expert 1.9 DT**
gráur, árg 1999,
**110.000**

**Skoda Octavia 1.6 v/aircon**
bláur, árg 2000,
4 hurðar, km. 48.000
**105.000**

**Opel Astra 1.7DT St. car**
reyður, árg 1999,
5 hurðar, km 52.000, fyrr 115.000,-
**nú 110.000**

**Ford Escort Van 1.8 Diesel**
gráur, árg 2000,
3 hurðar, km. 74.000, nýsýnaður
**v/mvg 68.000**

**Opel Astra 1.7DT**
bláur, árg 1996,
5 hurðar, km. 159.000, fyrr 52.000,-
**nú 45.000**

**VW Polo Classic SDi**
bláur, árg 1998,
4 hurðar, km. 71.000
**89.000**

**Opel Astra 1.6 v/aircon.**
bláur, árg 1998,
5 hurðar, km. 41.000
**98.000**

**Toyota HiAce 2.4d**
bláur, árg 1998,
4 hurðar, km. 118.000
**v/mvg 110.000**

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin 341800

# Søkt verður eftir kokkalærlingi

Nærri upplýsingar fáast við at ringja tel 21 34 30

www.marcopolo.fo

MARCO POLO
Tlf 31 34 30

Sosialurin 341800

## Avloysari fyri skúlavørðin á Skúlanum á Ziskatrøð

Í sambandi við farloyvi søkir Skúlin á Ziskatrøð við hesum eftir avloysara fyri skúlavørðin at byrja 4. august 2003 og til 29. februar 2004.

**Arbeiðsøkið** fevnir um bygningarnar og økið, sum hoyrir til Skúlan á Ziskatrøð.

**Arbeiðsuppgávurnar.**
Við tilvísing til leiðslu skúlans fevnir starvið m.a. um dagligt eftirlit, reinhald og viðlíkahald av bygningum, innbúgvi, amboðum, skúlagarði og uttanumøki annars.

Skúlavørðurin hevur somuleiðis dagliga umsjón og eftirlit við reingerðingini av skúlanum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava handverkaraútbúgving ella aðra útbúgving og starvsroyndir á økinum, skal duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

**Lønar- og setanartreytir** eru sambært sáttmálan við Starvsmannafelagið, lønarflokkur 3.

Í sambandi við møguligar bygnaðarbroytingar verður skúlavørðurin at tola broytingar í arbeiðsøki og setanartreytum.

**Fleiri upplýsingar** kunnu fáast við at venda sær til Ásbjørn Lómaklett skúlastjóra, tlf. 21 55 57 ella 45 67 49.

**Umsóknir** saman við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða:

**Skúlanum á Ziskatrøð**
**Postboks 53**
**FO-700 Klaksvík**

í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 25. juli 2003.

**Klaksvíkar Býráð**

# Hygg her!

**Hví mála og pussa, tá ið tú kanst gera bæði í somu arbeiðsgongd.**

**SKALCEM, puss og máling fæst frá**

**Arni Samuelsen**
**tel 455 775**



Sosialurin 341800

## Tannlæknastovan hjá Steintór Larsen

Vit eru í summarfrí frá 7. juli til og við 13. august.

**Steintór Larsen, tannlækni**

# Lærarar

Søkt verður eftir fýra lærarum. Størvini eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2003/2004.

Eitt starv, sum hevur 26 undirvísingartímar, hevur m.a. heimkunnleika, hondarbeiði og gentuítrótt.

Eitt starv, sum hevur 25 undirvísingartímar, hevur m.a. føroyskt í framhaldsdeildini, natúr og tøkni, dreingjaítrótt og bókasavn.

Eitt starv, sum hevur 23 undirvísingartímar, hevur m.a. føroyskt í framhaldsdeildini.

Eitt starv, sum hevur 12 undirvísingartímar, hevur bert dreingjaítrótt.

Eisini verður søkt eftir tveimum avloysarum fyri lærarar í barnsburðarfarloyvi.

Annað starvið, sum hevur 19 undirvísingartímar, er frá skúlaársbyrjan til 30. november 2003.

Hitt starvið, sum hevur 27 undirvísingartímar og inniheldur m.a. natúr og tøkni og enskt í 6. flokki, er frá skúlaársbyrjan til 15. oktober 2003.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 12. juli.

**Runavíkar Skúlastýri**
v/ Malan Rasmussen
FO 660 Søldarfjørður

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2074, Sp/f Hovsá, 900 Vágur.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Amy Bech, 926 Lopra (formaður)og Gudmund Strømsnes, N-6900 Florø.
**Innkomin í nevndina:** Christian Andreasen, Høvdagøta 6, 160 Argir (formaður) og Kári Nielsen, Pedda við Steinsgøta 7, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 3. juli 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3515, Sp/f Spuni, 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 19.06.2003.
**Nýtt hjánavn:** Sp/f Igloo (Sp/f Spuni)

*Skráseting Føroya tann 3. juli 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3625
**Navn:** Sp/f S.D.Beding
**Adressa:** 620 Runavík.
**Kommuna:** Runavíkar Kommuna
**Stovningardato:** 30.06.2003
**Viðtøkudato:** 30.06.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Eyðun Anthoniussen, Undir Nesinum, 650 Toftir og Sørin Svenning Danielsen, 650 Toftir.
**Stjórn:** Sørin Svenning Danielsen, 650 Toftir.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.03.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at veita tænastur innan bátasmíð og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 3. juli 2003*

*Kristin Balle*



# Almannastovan

## Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki.
Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
Fylgjarauppgávur Stimbran Familjuráðgeving Umlætting

**Størvini eru hesi:**
**í Eysturoy**

1) At stuðla og stimbra einum skúlabarni og familjuni í síni heild.
Tímatalið er 30 tímar um vikuna.
Fólk, ið hava royndir innan hetta øki, hava fyrimun.

**Vikuskiftisfamilja**

2) Søkt verður eftir eini vikuskiftisfamilju til at vera um eina 11 ára gamla gentu triðja hvørt vikuskifti, og annars tá tørvur er á tí.

Størvini skulu setast sum skjótast.

Setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Barnaforsorgartoymið á tlf. 353510, gerandisdagar millum klokkan 09.00 og 13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknin saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu vera

**Almannastovuni**
J. Broncksgøta 27
Postboks 3096
110 Tórshavn

í hendi í seinasta lagi 15.07.2003.

Í umsóknini skal vera tilskilað uppgávunummar.



# Runavíkar kommuna

søkir eftir

## Pedagogum til nýggja barnagarðin á Mýrunum

*Kongshavnar barnagarður og vøggustova flytir í nýggja barnagarðin á Mýrunum 1. august 2003.*
*Stovnurin er kommunalur stovnur hjá Runavíkar kommunu, og er normeraður til 94 børn. Stovurnar eru skipaðar við 2 vøggustovum við 14 børnum í hvørjari, 3 barnagarðsstovum við 18 børnum í hvørjari og einari barnagarðsstovu við 12 børnum.*

*Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmið. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.*



Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

Vit ynskja tí at umsøkjarin:
- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirblikk og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

Søkt verður eftir 6 pedagogum 40 t. um vikuna.

Setan verður frá 1. august 2003 ella eftir nærri avtalu.

Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í starv í avmarkaða tíð.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Fríðu Lómstein á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 21. juli, kl. 12:00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 FO-600 Saltangará
Tel. 417000 Fax 417001
E-mail: runavik@runavik.fo

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA**



**Svimjihøllin**
Í høllini starvast 20 fólk. Starvsfólki skal upp til lívbjargararoynd eina ferð um árið. Tey nema sær eisini víðkað skeið í fyrstuhjálp

**Upplatingartíðir í summar:**
mánadag 6.45 - 20.00
týsdag 6.45 - 20.00
mikudag 6.45 - 9.00
hósdag 6.45 - 20.00
fríggjadag 6.45 - 20.00
leygardag 9.00 - 17.00
sunnudag: 8.00 - 10.00
og 14.00 - 17.00

www.svimjihollin.fo

## Lívbjargari

Søkt verður eftir einum kvinnuligum lívbjargara til svimjihøllina.

Starvið fevnir umframt um arbeiðið sum lívbjargari at taka eina hond í ymiskt í tí dagliga.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal vera góður svimjari og hava stóru lívbjargararoyndina, annars verður skipað fyri lívbjargararoyndini á staðnum. Heilsuváttan má útvegast.

**Setanarviðurskifti**
Talan er um eitt fulltíðarstarv, ið eru skipað í vaktum. Starvið verða sett 1. august 2003. Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Hera Olsen, svimjihallarleiðara, tlf. 31 15 50 ella Jákup Simonsen, deildarleiðara á mentamáladeildini tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 20. juli 2003. Viðmerk "Lívbjargari" á umsóknina.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

# MINNINGARGRUNNUR DÁNJAL NICLASEN

Við hesum verður sagt frá, at umsóknir fyri 2003 um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen eiga at verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin, hin 25. juli 2003.

Umsóknarblað fæst við at seta seg í samband við Fiskasøluna, tel. nr. 345 345, og verður at senda til nevndina í Minningargrunni Dánjal Niclasen:

**Minningargrunnur Dánjal Niclasen**
**c/o Føroya Fiskasøla**
**Undir Bryggjubakka 31**
**FO-100 Tórshavn**
**Att.: Árni Arge, nevndarformaður**

*Endamálið við Minningargrunni Dánjal Niclasen er at stuðla ungum føroyingum, ið vilja útvega sær víðari útbúgving innanfyri føroyska fiskivinnu, eitt nú hvat viðvíkur:*

1. *Kanning av fiskiskapi uttanfyri Føroyar, sum kann bera í sær nýggjar veiðuhættir ella veiðu av fiskasløgum, ið ikki hava verið vanlig í Føroyum.*
2. *Víðari útbúgving, ið hevur við viðgerð og góðsking av fiski og fiskavørum at gera.*
3. *Marknaðarkanningar til frama fyri føroyska fiskivinnu.*
4. *Serútbúgving í handils- og fíggjarviðskiftum, sum hava við fiskivinnu at gera.*

Sosialurin 341800